# – Ein av mínum størstu

**23 ára gamli Reðin Húsdal Leonsson úr Sørvági var saman við 7500 øðrum partur av litríka Sydney Mardi Gras, sum er ein av heimsins størstu skrúðgongum fyri samkynd.**
**– Persónliga vil eg siga, at hetta er ein av mínum størstu upplivingum, sigur Reðin**

MENTAN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Reðin Húsdal Leonsson er úr Sørvági. Hann er 23 ára gamal, samkyndur og lesur sálarfrøði í Bond University á Gold Coast í Avstralia. Undir slagorðinum "Faroe Islands moving forward" var hann leygarkvøldið saman við trimum vinfólkum partur av árliga Sydney Mardi Gras – ein av heimsins størstu skrúðgongum fyri samkynd.

### Fagnaðu 266b

Her heima í Føroyum merkjast eftirskjálvtarnir av samtyktini, um at fáa grein 266b í revsilógini eisini til at fevna um samkynd, við jøvnum millumbili. Men eisini uttan í heimi síggjast framvegis ringar í sjónum eftir umstríddu løgtingssamtyktina. Herfyri skrivaðu vit í Sosialinum, at náttklubbin Jacques í Keypmannahavn, sum hevur føroyskar eigarar og nú er eitt stað, har samkynd hittast, skipaði fyri einum sokallaðum "266b kvøldið". Nú hava ringarnir breitt seg til Avstralia, har Reðin Húsdal Leonsson, saman við vinfólkum sínum, fagnaði løgtingssamtyktini. Hetta gjørdi hann við at luttaka í Sydney Mardi Gras, har hann saman við trimum vinfólkum bar ein bannara við áskriftini "Faroe Islands moving forward".

– Orsøkin til at vit vóru við í skrúðgonguni, var fyri at fagna at Føroyar nú hevur samtykt grein 266b, og hevur tikið eitt avgerandi fet á rætta leið móti javnstøðu fyri øll, sigur Reðin.

– Tá ið eg avgjørdi at umboða Føroyar søgdu vinfólkini beinanvegin, at tey vildu stuðla mær í hesum og vísa takksemi fyri, at so nógv hjálptu til at fáa hesa lóg samtykta, greiðir Reðin frá.

### Forsetin nevndi Føroyar

Men tað vóru ikki einans Reðin og vinfólk hansara, sum fagnaðu og fegnaðust um avgerðina, sum Føroya løgting tók.

Við heimasíðuna www.stuff.co.nz, greiddi forsetin fyri Sydney Mardi Gras,




*Reðin Húsdal Leonsson saman við vinfólkum sínum til Sydney Mardi Gras. Reðin stendur millum damuna í hvíta kjólanum og mannin við bláu fjaðrunum á høvdinum*